### Búskapur og vinna:
## Verkfall

18 flogskiparar, sum flúgva við tyrlunum, sum flyta fólk til og frá donsku tyrlupallunum í Norðsjónum, eru í verkfalli. Teir 18 menninir starvast hjá kanadiska felagnum Canadian Helikopter Corporate, sum hevur flúgvingina um hendi.

Flogskipararnir eru farnir í verkfall, tí kanadisku arbeiðsgevararnir vilja ikki geva teimum somu sømdir og rættindi, sum teirra starvsfelagar í Noregi, Skotlandi og Hollandi hava. M. a. skulu teir donsku flogskipararnir flúgva 1000 tímar um árið, meðan hinir einans skulu flúgva 800 tímar árliga.

## Ericsson tapti

Fyri fyrstu ferð minkaði fartelefonsølan í 2001. Sambært altjóða hagtølum vórðu 400 mió. færri fartelefonir seldar í fjør enn árið fyri, og tann stóri taparin var svenska fyritøkan Ericsson. Í fjør var marknaðarparturin hjá Ericsson 5,5 prosent ímóti 10 prosentum í 2000.

Hinvegin vaks marknaðarparturin hjá finsku fyritøkuni Nokia úr 30 prosentum í 35 prosent. Afturgongdin hjá Ericcson bar samstundis í sær, at fyritøkurnar Motorola, Samsung og Siemens nú eru størri á fartelefonmarknaðinum enn tann svenska fyritøkan. Ericsson samstarvar við japanska fyritøkuna Sony, og í síðstu viku sendu tær fleiri nýggjar fartelefonir á marknaðin.

## Nógv brek

Ein kanning hjá danska FDM vísir, at alt ov nógvir brúktir bilar hava brek, sjálvt um bilasølurnar siga teir vera í lagi.

Kanningin vísir, at brek vóru við 95 prosentum av teimum brúktu bilunum, sum FDM kannaði fyri síni viðskiftafólk í fjør. Úrslitið hevur fingið FDM at mæla fólki til at lata serkønar kanna brúktu bilarnar, áðrenn tey keypa. Sambært kanningini vórðu brek funnin við øllum bilmerkjum, men ringast stóð til við teimum týsku bilunum.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Enn ein blóðug nátt



*Ísraelskir hermenn taka sær støð í býnum Qalqilya á Vestara Áarbakka*

*Mynd: Reuters*

**- Framferðin hjá ísraelska herinum er einki annað enn krígsbrotsverk, sigur palestinski samráðingarleiðarin, Saeb Erekat**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*

Minst 21 palestinar doyðu, tá ísraelski herurin gjáranáttina søkti at einari palestinskari flóttafólkalegu í Gaza-geiranum. 50 palestinar vórðu særdir.

Ísraelski herurin leyp á flóttafólkaleguna Jabaliya við stríðsvognum og tyrlum. Umleið 200.000 fólk búgva í leguni, sum er ein tann største í teimum palestinsku økjunum. Palestinskir talsmenn søgdu í gjár, at ísraelskir hermenn kringsettu fyrst leguna, áðrenn stríðsvognarnir fóru inn í sjálva leguna. Samstundis lupu stríðstyrlurnar á.

Palestinski samráðingarleiðarin, Saeb Erekat, segði í gjár, at álopið á Jabaliya var ikki annað enn framhald av krígsbrotsverkunum hjá ísraelska forsætisráðharranum, Ariel Sharon.

- Álopið prógvar, at Sharon heilsar teimum báðum amerikansku semingsmonnunum, Dick Cheney og Anthony Zinni, vælkomnum við palestinskum blóði, segði Saeb Erekat.

Dick Cheney, varaforseti skal hitta fleiri leiðarar í Miðeystri teir næstu dagarnar, og Anthony Zinni, sum er serligur semingsmaður hjá George W. Bush, forseta, skal royna at fáa ísraelsmenn og palestinar til samráðingarborðið.

# Telja upp eftir ruðuleikaval

**Valið í Zimbabwe endaði, sum tað byrjaði við longum bíðirøðum uttan fyri valstrøðini. Mong sluppu ikki framat at velja, og skuldsetingar vóru longu í gjár um valsvik**

ZIMBABWE

*Árni Joensen*

Longu mánadagin vildu almennu zimbabwisku fjølmiðlarnir vera við, at Robert Mugabe, forseti hevði vunnið valið. Tá stóðu fólk í longum bíðirøðum uttan fyri valstøðini í høvuðsstaðnum Harare og øðrum stórum býum, og ein áheitan frá andstøðuni um at leingja valið ein dag afturat vann ikki frama í hægstarætti.

Andstøðuflokkurin MDC legði dorsetan og stjórnina undir at hava skert talið á valstøðum í Harare og hinum býunum fyri at forða fólki at sleppa at velja. Júst andstøðan stendur sterk í býunum, og summir veljarar greiddu mánadagin frá, at tað tók hvørjum veljara átta minuttir at fáa pappírini góðkend inni í valhølunum.

Andstøðuleiðarin, Morgan Tsvangirai, segði í gjár, at forsetin og stjórnin mugu átaka sær ábyrgdina av møguligum ófriði, tí nógvir veljarar vóru sera misnøgdir við, at teir ikki sluppu at greiða atkvøðu.

### Ikki frítt val

Í gjár var ikki greitt, hvønn dóm valið í Zimbabwe fór at fáa frá teimum útlendsku eygleiðarunum, sum fylgdu valinum, men fleiri evropeiskir politikarar hava longu sagt, at valið var ikki frítt.

Eysturríkski uttanríkisráðharrin, Benita Ferrero-Waldner, segði longu mánadagin, at valið í Zimbabwe var hvørki frítt ella rættvíst. Í gjár segði hon seg hava fingið frágreiðingar úr Harare, sum prógvaðu tað, hon hevði sagt.

Tríggir av leiðarunum í andstøðuni vórðu tiknir mánadagin, og ein talsmaður hjá MDC segði, at sumstaðni høvdu hermenn rikið eygleiðararnar burtur frá valhølunum.

Fýra amerikanskir diplomatar, sum vóru komnir til Zimbabwe, vórðu eisini tiknir mánadagin og hildnir aftur í fleiri tímar.

### Úr Norðurlondum:
## ES má bíða

Fyrrverandi norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, heldur ikki, at teir norsku politikararnir eiga at skunda undir orðaskiftið um møguligan norskan limaskap í ES.

So seint sum mánadagin vísti einkanning, at mótstøðan ímóti limaskapi er vaksin í seinastuni, men Jens Stoltenberg væntar, at undirtøkan fyri limaskapi fer at veksa í komandi tíð.

Á einum fundi í Hammerfest mánadagin segði Stoltenberg, at tað verður fiskivinnan, sum fær teir størstu fyrimunirnar, fer Noreg upp í ES.

## Eitt danskt mál

Ein kanning hjá lærda háskúlanum í Keypmannahavn staðfestir, at alt fleiri danir sleppa sínum upprunaliga máli og velja at tosa Keypmannahavnardanskt ella ríkisdanskt ístaðin.

Tore Kristiansen, lektari sigur, at sjálvt nógv, sum eru uppvaksin við tí eyðkendu suðurjútska málinum, fara frá tí og velja at tosa ríkisdanskt ístaðin. Lektarin sigur, at nógvastaðni eru tey gomlu bygdamálini um at hvørva.

Sambært Tore Kristiansen velja mong at sleppa sínum bygdamáli, tá tey koma í hægri skúla so sum studentaskúla, og at tey samstundis sleppa einum parti av sínum samleika.

## Mistu nógvan seyð

Bøndur í Norðurnoregi hava mist nógvan seyð í tí nógva kavanum í vetur.

Einir hundrað bøndur í Nordlandi hava seyðin gangandi úti um veturin, men nú vilja myndugleikarnir hava teir at taka seyðin inn.

Djóralæknatænastan í Nordlandi heldur, at einir 50 seyðir eru deyðir í kavanum har norðuri í vetur.